# AGANEVNDIN

**KÆRA 12/2008**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá FRAM um at AB hevur brúkt leikbannaðan leikara í 2. deildardysti** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskapping |
| Brot framt: 27.08 2008 | Kæra innkomin: 28.08.2008 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 5 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: Nei |

# AGANEVNDIN

## 1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

FRAM førir fram, at AB nýtti ólógligan leikara í 2. deildardysti nr. 12, 27. aug., við tað at umrøddi leikari varð sektaður við 2 daga leikbanni í 1. deildardysti hin 9. aug. og tí ikki kundi luttaka í dystinum, sum varð leiktur 27. aug.

AB váttar, at leikarin fekk 2 dagar leikbann fyri reytt kort í 1. deildardysti leiktur 9. aug. og tí leikti hann ikki við 1. deildardystunum ávikavist 16. august og 23. august. AB er av teirri fatan, at umrøddi leikari tí ikki hevði leikbann, tá 2. deildardysturin millum AB-FRAM varð leiktur hin 27. august. Eisini førir AB fram, at sambært grein 36 í kappingarreglunum fær leikari leikbann í teirri deild, hann varð rikin úr leiki og at 2. deildardysturin AB-FRAM ikki er í somu deild.

Starvsnevnd FSF's hevur í sínum ummæli ført fram, at tá leikarin sat yvir leikbann hin 23. aug., og síðani hevur leikt við 2. deild hin 27. august, so lýkur hann ikki treytina sum lógligur leikari í 2. deild, tí 1. deild hjá AB hevur ikki leikt nakran dyst eftir at leikbannið varð sitið av og til 2. deildardystin 27. august. Við øðrum orðum er Starvsnevndin av teirri áskoðan, at talan er um ólógligan leikara sambært regluni um upp- og niðurflyting millum deildir, og ikki um ólógligan leikara vegna leikbann.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5 litra d kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's og at sekta staðfest brot sambært grein 8 í agareglugerðini.

## 3. Fakta í málinum

Sambært dómaraseðlanum varð AB-leikarin rikin av vølli í dysti í 1. deild millum AB-B68 hin 9. august. Kappingarnevndin avgjørdi hin 15. august, at geva AB-leikaranum tilsamans 2 daga leikbann.

Dómaraseðlar dagfestir ávikavist 17.08.08 og 27.08.08 fyri 2. deild menn millum ávikavist B36-AB og AB-FRAM vísa, at sami AB-leikari leikti hesar dystir í 2. deild menn.

## 4. Lógarverkið

§ 36 í Kappingarreglunum fyri fótbólt fevnir m.a. um leikarar, ið verða riknir úr leiki.

## AGANEVNDIN

§ 8 í Kappingarreglunum fevnir um flytan millum deildir. Grein 8, stk. 1 ásetur, at "Leikari, sum hevur luttikið í landskappingini í eini deild, kann ikki luttaka í landskappingardysti í eini lægri deild, uttan at felag hansara í millumbilinum ella sama dag, hevur leikt landskappingardyst, sum hesin ikki luttók í, í hægru deildini, hóast viðkomandi leikari lógliga kundi luttaka. Tá felag leikar í fleiri deildum, roknast hægsta deildin at hava leikt fyrst."

Ongar reglur eru í regluverki FSF's sum umrøða leikbannaðir leikarar, sum flyta ímillum og spæla í hægri og lægri deild.

### 5. Staðfestingar, metingar, o.t.

Aganevndin staðfestir, at leikbann skal sitast av í teirri kapping og deild, tað er fingið í, sbr. § 36 í kappingarreglunum og FIFA Disciplinary Code artikkul 38, stk. 1. Aganevndin staðfestir eisini, at leikari lógliga kann flyta úr hægri til lægri deild at leika eftir reglum FSF's, serliga grein 8, stk. 1 í kappingarreglunum. Treytin er, at ein dystur er leiktur í hægru deildini, sum viðkomandi aftur lógliga kundi leikt, men sum leikarin hevur sitið yvir. Rættarstøðan, sum Aganevndin lesir og tulkar reglurnar, er skitsera niðanfyri:




Aganevndin er sostatt samd við Starvsnevnd FSF's í, at AB-leikarin ikki lýkur treytina sum lógligur leikari í 2. deild í dystinum 27. august millum AB-FRAM, av tí at 1. deildarliðið hjá AB ikki hevur leikt nakran dyst, áðrenn ella sama dag, har leikarin kundi sitið dyst yvir sum lógligur leikari fyri síðani, ella sama dag, lógliga at luttaka í 2. deild sambært reglunum um upp- og niðurflyting millum deildir sambært grein 8, stk. 1 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

### 6. Niðurstøða

AB-leikarin er at rokna sum ólógligur leikari í 2. deildardystinum millum AB-FRAM, ið varð leiktur 27. august, grundað á treytirnar um lógliga upp- og niðurflyting millum deildir sambært grein 8 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikarum er álvarsligt brot á regluverk FSF's og ta skipan, ið er gjørd fyri brúk av leikarum. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum er sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.

AGANEVNDIN

| 7. Úrskurður |
| --- |
| Við heimild í grein 8, stk. 1, bókstav h í agareglugerð FSF's verður AB, 2. deild menn dømt at tapa dystin móti FRAM hin 27. aug. 2008 við málmuninum 0-0, sbr. grein 40 í Kappingarreglunum. |
| **8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.** |
| Sambært grein 12 í agareglugerðini kann avgerðin um at AB skal tapa dystin, kærast til Yvirkærunevndina. Kærast skal innan 5 dagar eftir at úrskurðurin er móttikin. |
| **9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**<br><br>**Tórshavn 19/09 - 2008**<br><br>Anni á Hædd<br>Anni á Hædd, formaður |